ÚT AT KOYRA

# Hvussu halda vit ásettu hámarksferðina?




*Vit síggja her, at har, sum loyvt er at koyra 50 km/t, eru tað 42%, sum halda hesa hámarksferð, 44% koyra millum 50-60, 12% millum 60-7, og 2% koyra meira enn 70 km/t*




*Her síggja vit, at har, sum loyvi er at koyra 90 km/t, koyra 50% lógliga, og 17% koyra skjótari enn 100 km/t. Á motorvegnum, har hámarkið er 110 km/t, eru tað somuleiðis 50%, ið koyra lógliga, og 22% koyra skjótari enn 120 km/t*

**Sum tað sæst á hesum myndunum, eru tað ikki øll, sum virða tær ásettu hámarksferðirnar. Hesi tøl eru gjørd eftir kanningum í Svøríki, men tendensurin er nokk tann sami her hjá okkum**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Tá tað kann prógvast, at fólk, sum verða ákoyrd við 50km/t, ofta doyggja av løstunum tey fáa, skal helst ikki koyrast meira enn 30 km/t, har fólk og bilar ferðast á somu breyt. Við nullhugsjónini verður staðfest, at stórur skaði stendst av, at bilar verða ákoyrdir frá síðuni við meira enn 50 km/t. Tí skal ikki koyrast meira enn 50 km/t gjøgnum krossvegir.

*Kelda: Petur J. Sigvardsen RFF*

# Postverk Føroya – heimsins størsta postkassa í SMS

**Í myndablaðnum NÚ fyri jólini 1984 stóð, at tað er eydnaðist Postverk Føroya at koma í Guinnes Book of Records við heimsins størsta postkassa. Á eini framsýning í SMS stóð eisini ein Mazda 616 avtakin við frímerkjum**

HEIMSMET
*Magnus Gunnarsson*

Postkassin, sum stóð í SMS í 1984, varð gjørdur akkurát sum ein vanligur postkassi, bara 10 ferðir størri. Hann var 6,421 m høgur, 3,783 m breiður og 1,993 djúpur. Umframt at kunna um føroysk frímerkir, var endamálið við hesum postkassanum eisini at fáa fólk at skriva brøv og senda eina heilsan gjøgnum Postverk Føroya.

Tað var Hans G.Bischoff, táverðandi marknaðarleiðarin Frímerkjadeildini, sum hevði sett seg í samband við Guinnes Book of Records og fingið ein umboðsmann frá teimum at koma hendan vegin.



*Heimsins størsti postkassi í SMS, sum kom í Guinnes Book of Record. Stillads varð gjørt, so fólk kundu ganga upp til brævsprekkuna. Niðast hørgumegin stendur ein postkassi í vanligari støðd*




*Hesin Mazda 616, hjá Hans G. Bischoff, marknaðarleiðara á Frímerkjadeildini, stóð avtakin við frímerkjum í SMS. Tað at bilurin hevur fleiri FDM búmerkir í kølaragittaranum kemst av at Hans G. Bischoff eisini var FDM umboðsmaður í Føroyum*

**Mazda við frímerkjum**

Tað vóru eisini onnur skemtilig tiltøk á framsýningini. Til dømis var ein Mazda 616 avtakin við frímerkjum. Hetta var ein kapping um at gita, hvussu nógv frímerkir vóru á bilinum. Umleið 5000 fólk vóru við í kappingini, sum Leivur Thomsen í Havn vann. Hann hevði talt 12.893 frímerkir og vann 2.000 krónur. Rætta talið var 12.895, so hann var bert 2 frímerkir frá tí rætta talinum.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**







